# Trupult at sleppa av við tunnilsgjaldið

**Eitt útlendskt par, sum fór við bili úr Vágum til Havnar, hevði stárarbeiði burtur úr at sleppa av við gjaldið fyri at koyra gjøgnum Vágatunnilin**



*Enn ber ikki til at gjalda við korti við gjaldstøðina hjá Vágatunlinum. Tað kann gera, at pengar, sum útlendskir bilar skuldu lagt eftir seg, verða mistir*

TUNNILSGJALD
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Eitt útlendskt par, sum um dagarnar hevur verið í Sørvági og ferðast, ætlaði sær ein túr til Havnar ein av døgunum. Sambandið er gott, so tað skuldi einki hindrað. Uttan bara tað, at tey mundu ikki sloppið at goldið fyri at koyra gjøgnum Vágatunilin.

Fólkini fóru, sum teimum var sagt av vertum sínum, í høgru breytina við gjaldsstøðina. Har ætlaði maðurin at gjalda við kredittkorti, men fann beinanveg útav, at tað riggaði ikki, hóast automatin var har.

Ein fryntligt vaktarfólk kom so og hjálpti honum at fáa ein seðil úr hesi automatini. Maðurin vildi fegin gjalda beinanveg, tí hann skuldi eftir ætlan heimaftur fyrsta dagin, so best var bara at fáa hetta yvirstaðið á staðnum.

Men nei. Tað lat seg ikki gera. Hann fekk frá vaktarfólkinum at vita, at hann mátti til Havnar at gjalda hetta. Tað mundi fara at vera á skrivstovuni hjá Vágatunlinum, helt hann.

Men tað var nú bara tað, at skrivstovuna hjá Vágatunlinum helt hesin útlendingurin seg ikki til at finna soleiðis uttan nakað. Tó eftir størri dedektivarbeiði funnu hesi lóglýdnu fremmandafólkini kortini eini hús, har eitt skelti á vegginum segði, at her búði Vágatunnilin.

Men her var heldur ikki bara sum at siga tað, at sleppa av við hetta góða gjaldið, tí skrivsovufólkið í húsinum vildi ikki taka ímóti hesum. Tað endaði tó við, at tey fingu tingað seg til at sleppa at gjalda, eftir sum tey nú høvdu havt hetta stríðið.

Men tá goldið var, vildi fremmandamaðurin sjálvandi hava eina kvittan. Og tað var verri, tí slíka áttu tey ikki á skrivstovuni. Skrivað varð á ein vanligan blokk, og so varð eitt fotokopi tikið, sum maðurin fekk við sær aftur sum kvittan.

Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelgnum Vágatunlinum, sigur, at arbeitt verður framvegis við gjaldskipanini, og at útlit eru fyri, at hon heilt skjott fer at virka.

Men hann ásannar, at í teimum førum, tá ein útlendingur fer gjøgnum tunnilin, er skjótt, at tað gjaldið, hann skuldi latið, kann misfarast.

Fer viðkomandi ikki á posthús ella í peningastovn, áðrenn hann fer av landinum, kann gerast trupult at finna hann aftur og fáa pengarnar innheintaðar.

– Tað kann lata seg gera, men tað verður tungt, sigur hann. Og so er spurningurin sjálvandi eisini, um tað fer at kosta meira enn sjálvt tunnilsgjaldið.

# Landið liggur myrkt við brestin

**Verða maskinmeistararnir hjá SEV raktir av verkfalli, gongur bara ein løta, til alt landið liggur í myrkri. Eingin motorur sleppur at ganga mannleysur, sigur SEV stjórin**

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

Endar støðan á arbeiðsmarknaðinum við, at sáttmálin millum SEV og Maskinmeistarafelagið skal tingast umaftur, sum so í ringasta føri kann enda við verkfalli, verða motorarnir hjá SEV sløktir, áðrenn maskinmeistararnir fara heim. Og so liggur landið í myrkri.

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at motorarnir hjá SEV kunnu ikki ganga mannleysir, so tað gongur bara heilt stutt tíð, til einki ljós er í landinum.

– Tað er so tað, vit høvdu at fyrihalda okkum til, tá skrivað varð undir sáttmálan, sigur SEV stjórin.

Hann sigur, at hann hevði hoyrt Karsten Hansen, landsstýrismann, siga á einum fundi, at hann fór ikki at góðkenna sáttmálan. Talan var ikki um samráðingarfund, tí Karsten Hansen luttók ikki í samráðingunum.

– Karsten Hansen kendi tá ikki sáttmálan, men hevði hoyrt um lønarrammuna. Síðan hava vit umvegis pressuna frætt, at Karsten Hansen ikki vil góðkenna sáttmálan, men hava enn einki frætt beinleiðis frá honum, sigur Klæmint Weihe.

Hann sigur, at hetta er móti vanligari mannagongd í slíkum førum. Skrivað stendur, at landsstýrið skal góðkenna broyting í galdandi reglum viðvíkjandi normeringum og lønum. Undir hetta verður so lønarsáttmálin flokkaður.

– Vanlig mannagongd hevur verið, at vit senda sáttmálan til góðkenningar, og so kemur hann góðkendur aftur. Landsstýrið plagar ikki at blanda seg upp í soleiðis, sigur Klæmint Weihe.

Hann undrast eisini á, at tað nú knappliga verður gjørt vart við í pressuni, at landsstýrismaðurin ikki vil góðkenna sáttmálan, sum hann fekk sendandi frá SEV longu tann 4. apríl.

Klæmint Weihe sigur, at nú verður viðgjørt, hvat gerast skal. Hann hevur frætt, at Karsten Hansen hevur biðið embætisfólk síni skriva eitt bræv, sum fer at boða frá, at sáttmálin ikki verður góðkendur. Tá tað er komið, veður málið tikið upp til viðgerðar.

Men verður endin í ringasta føri tann, at maskinmeistararnir hjá SEV enda í einum verkfalli, merkjast fylgurnar beinanveg, sigur Klæmint Weihe, stjóri á SEV.

– Menninir sleppa ikki av verkinum, fyrr enn sløkt er.



*Motorarnir hjá SEV sleppa ikki at ganga mannleysir. Fara maskinmeistararnir í verkfall, verða motorarnir sløktir, áðrenn menninir fara av verkinum. Og so liggur landið í myrkri*



# Út av lagi í Argja skúla

**Foreldur at børnum í Argja skúla halda, at umstøðurnar á skúlanum eru so vánaligar, at okkurt má gerast. Foreldrini krevja eina heildarætlan**



*Mai Laksáfoss Simonsen handar her borgarstjóranum í Havn, Jan Christiansen, 221 undirskriftir við tí fyri eyga at fáa betraðar umstøðurnar í Argja skúla*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

ARGJA SKÙLI
*Heri á Rógvi*

Vanliga eru tað næmingarnir, sum skulu lata síni verk inn til evsta myndugleikan, læraran. Men hósmorgunin máttu foreldrini manna seg upp og fara á gátt hjá Jan Christiansen, borgarstjóra.

Ein bólkur av foreldrum, eini átta í tali, høvdu nøkur pappír við sær til borgarstjóran. Fyrst eitt bræv, har greitt var frá teirra ónøgd við verandi umstøður hjá børnum teirra í Argja skúla, og 221 undirskriftum.

Á longum lista, har foreldrini hava uppremsað, hvørji viðurskifti mugu betrast, stendur fyrst av øllum, at Brunaumsjón Landsins eftir at hava sýnt skúlan er komin til ta niðurstøðu, at bygningarnir ikki eru í forsvarligum standi, bæði viðvíkjandi fólkatrygd og bygningunum sjálvum.

Og hetta lovaði Jan Christiansen eisini, at farið varð undir at betra fyrst av øllum.

– Arbeiðið er farið ígongd, lovaði Jan Christiansen.

Tey átta foreldrini í fundarhølunum hjá borgarstjóranum vóru púra greið: Viðurskiftini eru alt ov vánalig!

Og kravið hjá foreldrunum er, at ein heildarætlan verður gjørd, soleiðis at sleppast kann undan óhepnum lappaloysnum.

Foreldrini meta, at vánaligu umstøðurnar gera, at hetta gongur útyvir trivnaðin, undirvísing og innlæring hjá børnunum. Ikki bara eru umstøðurnar hjá børnunum vánaligar, men hetta er so sanniliga eisini galdandi fyri lærararnar og skúlaleiðsluni, meta foreldrini.

Tað er væntandi, at nógv størri trýst verður lagt á skúlan í komandi árum við enn fleiri næmingum, og tískil er neyðugt við einari varandi loysn, halda foreldrini.

## Vónar

Eftir at Mai Laksáfoss Simonsen hevði handað Jan Christiansen skrivið og undirskriftirnar, so greiddu foreldrini borgarstjóranum frá teirra krøvum, og borgarstjórin segði seg ásanna, at talan er um ein trupulleika, sum arbeitt eigur at vera við.

365 næmingar hava sína dagligu gongd í Argja skúla og so koma lærararnir afturat.

Komandi skúlaár verður næmingatalið nakað tað sama.

Mai Laksáfoss Simonsen og hinu foreldrini høvdu 221 undirskriftir við sær. Sjálv heldur Mai, at hetta er væl umboðað.

– Nøkur foreldur eiga fleiri børn í skúlanum, og summi, sum ikki eru foreldur, men vara av børnunum, hava eisini skrivað undir, sigur Mai Laksafoss Simonsen.

Hon heitti á borgarstjóran um staðiliga at syrgja fyri, at ein heildarætlan fyri Argja skúla skuldi gerast veruleiki.

Jan Christiansen segði, at hann og býráðið vóru greið yvir, at illa stendur til við Argja skúla.

– Argja skúli er illa sperdur, og hann er eisini raðfestur ovast í umfatandi byggiætlanini av skúlunum í kommununi, sigur Jan Christiansen.

Í løtuni verður arbeitt við tveimum loysnum. Eitt er bygningurin hjá Postverki Føroya á Argjum. Hann vil Postverk Føroya fegið selja til Tórshavnar kommunu, og kommunan er sannførd, at her er talan um eina góða og skjóta loysn. Trupulleikin er bert tann, at Postverk Føroya vil hava vinningin av søluni sjálvt, og sum er, so vil vinningurin enda í landskassanum. Tískil verður nú arbeitt við einari ætlan at leiga ein part av bygninginum hjá Postverki Føroya á Argjum, men júst hvør tann endaliga loysnin verður er óvist.

Tórshavnar býráð hevur eisini á býráðsfundi samtykt at seta tólv milliónir av til at útbyggja Argja Skúla.

Talan er um eina verkætlan fyri 12,55 mió. og fer at merkja seks nýggjar skúlastovur umframt onnur høli. Tríggir milliónir eru fyribils settar av. Ætlanin hjá Tórshavnar býráð er, at farast skal undir um- og nýbyggingar av skúlunum í kommununi í fíggjarárinum 2004 serliga.

Og Mai Laksáfoss Simonsen sigur seg trúgva tí, sum borgarstjórin førdi fram, og hon vónar inniliga, at álvari verður av ætlanunum, so talan ikki verður bert um prát.

## Út av lagi

Men hóast bæði nýggjar stovur og bygningurin hjá Postverkinum koma undir land, so er hetta framvegis ikki nóg gott, heldur Mai Laksáfoss Simonsen. Tað skal meira til.

– Skúlin er á øllum økjum helvtina ov lítil, sigur Mai.

À langa lista yvir umstøður, sum skulu betrast, verða serstovur eisini nevndar. Hesar eru ov fáar sum er, og tær, sum eru, mugu betrast.

Øv øðrum umstøðum kunnu nevnast, at skúlastjórin ikki hevur egið kontór, har møguleiki er at práta í trúnaði. Lærararnir hava bert eitt »kopirúm« at arbeiða í.

Skúlin er so illa sperdur, at allir næmingar, sum kundu hugsað sær, ikki kunna ganga í Argja skúla.

Neyðugt er í fleiri førum at lata næmingarnar fara aðrastaðni.

# Fólkaatkvøða í Kirkjubø

**Fólk í Kirkjubøar kommunu skulu 24. mai á fólkaatkvøðu um samalegging við Tórshavnar kommunu**

KOMMUNUR
*Heri á Rógvi*

Tórshavnar kommuna og Kirkjubøar kommuna, sum telir Kirkjubø og Velbastað, hava tikið eitt stórt fet nærri samanlegging. Bæði býráðið í Havn og bygdarráðið í Kirkjubø hava einmælt samtykt at góðkenna eitt fylgiskjal til ein sáttmála í sambandi við ætlaðu samanleggingina.

Tað einasta, sum restar í, er, at íbúgvarnir í Kirkjubøar kommuna góðkenna sáttmálan við at atkvøða ja 24. mai, tá fólkaatkvøða verður hildin. Eftir hetta verður sáttmálin undirskrivaður, um svarið er ja til samanlegging.

Sáttmálin inniber, at kommunurnar verða lagdar saman 1. januar 2005, men farið verður undir tætt samstarv longu 1. januar 2004. Kommunurnar samstarva longu nógv saman sum er.

Annfinn Brekkstein, borgarstjóri á Kirkjubøar kommunu, sigur, at fylgiskjalið og sáttmálain verða borin út í hvørt hús í kommununi, og ein borgarafundur verður hildin 20. mai í skúlanum á Velbastað.

Hann ynskir ikki at gera nakra meting um, hvat úrslitið verður, men hann og bygdarráðið eru samd um, at hetta er tann besta loysnin fyri Kirkjubøar kommunu.

– Vit hava diskuterað hetta øgiliga væl, og vit eru komin til tað niðurstøðu, at tað er best fyri okkum at leggja saman. Skulu vit bjóða tær tænastur og átaka okkum tær uppgávur, ið borgarin væntar, so er tað besta eina samanlegging, sigur Annfinn Brekkstein.

226 fólk búgva í Kirkjubøar kommunu, og fíggjarætlanin javnvigaði við 6,1 millión fyri 2003.

Annfinn Brekkstein nevnir, at kommunan hevur tørv á at gera nógv fleiri íløgur, enn myndugleikarnir loyva, og hetta er ikki nøktandi í longdini.